


## PINKUFETLAR - PERFEKTIR TIL ÓLAVSØKUNA

**Vit hava meiri enn 10 ymisk slag av pinkufetlum**

- Pinkufetlar til børn 0-3 ár
- Lætt at koma runt millum mannamúgvir (Á Ólavsøku), í/úr bussi, í náttúruni, trappur, í kava o.a.
- Lindrar um barnið hevur kolik
- Fríar hendur til onnur geramál
- Stimbrar rørslumenningina og sansarnir hjá barninum
- Sera vælegnað til ov tíðliga født børn - "kengurumetodan"
- Tað ber til at geva bróst meðan barnið liggur í pinkufetlinum

**Eisini selja vit AmmiBH, Ammipútur, Ammiblusir, Leikur, BellyBelt, Ranglur v.m.**

***Á Ólavsøku 28. og 29. juli millum kl. 14-17 eru vit í Losjuni.***

**- Ring og hoyr nærri á tlf. 58 00 98 - BEMBLA v/Katrin Arge**





**VINNUMÁLARÁÐIÐ**

# Avloysari fyri leiðsluskrivara í barnsburðarfarloyvi

Vegna starvsfólk í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir leiðsluskrivara til Vinnumálaráðið at byrja 12. september 2005 og í uml. 12 mánaðir fram.

Arbeiði fevnir um:
- Landsstýrismannaskrivari
- Dagføringar av heimasíðuni
- Fyrifallandi skrivstovuarbeiði, t.d.
    - rættlestur
    - málsavgreiðsla
    - journal og postavgreiðsla

**Vit hugsa okkum, at tú hevur:**
- skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt
- kunnleika til EDV á brúkarastøði
- góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, sum tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, viðmælum o.ø. verða sendar til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. august 2005.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Vinnumálaráðið á telefon 35 60 60.

# Hjálparfólk søkjast

Sandavágs kommuna søkir eftir hjálparfólkum til fyribils og tíðaravmarkað størv til Sóljugarð.

Talan er um:
- Eitt fulltíðar starv við møguleika at arbeiða niðursetta tíð, t.d. 35 ella 30 tíma viku, til vøggustovu at byrja 15. august ella eftir avtalu.
- Eitt barsilsvikariat á 30 tíma viku til vøggustovu at byrja 1. september.
- Eitt 25 tíma starv til frítíðarheimið at byrja 15. august ella eftir avtalu.

Barnagarðurin er í 5 eindum við vøggustovu, barnagarði og frítíðarheimi. Stovnurin er vanliga opin frá kl. 7.30 til 17.00.

Í dagliga arbeiðinum leggja vit m.a. stóran dent á:
- Trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum
- At seta okkum inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- At skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- At hava gott samstarv bæði við starvsfólk og foreldur.

Vit hava sera góðar umstøður, bæði uttandura og innandura.

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya kommunala Arbeiðsgevarafelag og fylgir lønarstigunum frá 1 til 15.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Caritu Björklund, leiðara.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um royndir og møguligum viðmælum skulu vera Sandavágs kommunu ella Sóljugarði, 360 Sandavágur, í hendi í seinasta lagi 11. august 2005. Viðmerk á brævbjálvan: »Hjálparfólk«.

Fólk, ið hava sent umsókn í juni/juli í sambandi við, at vit hava søkt eftir námsfrøðingum, verða tikin við. Onnur, ið fyrr hava søkt, eru vælkomin at venda sær til okkara og vísa til áður senda umsókn.

SANDAVÁGS KOMMUNA

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur til B8

Eitt fast starv á 0,8 brøk í skiftandi vaktum, er leyst til setan frá 1. september 2005 ella eftir avtalu.

**Arbeiðsøki er í høvuðsheitum:**
- røkt og viðgerð til kardiologiskar sjúklingar
- deildin hevur pláss til 12 sjúklingar

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu og upplæring
- arbeiðið er fjølbroytt og tær nógvu avbjóðingarnar gera størvini sera spennandi

**Krøv til umsøkjarar**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í røkt og viðgerð av cardiologiskum sjúklingum
- góð samstarvsevni

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- cardiologiskar royndir
- cardiologiska eftirútbúgving

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at venda sær til Heiði B. Rasmussen varaleiðara telefon 304500, lokal 6068 ella lokal 6008 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102 e-post asap@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 10. august 2005 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn** merkt »umsókn til starv« við CV, avrit av prógvum, autorisatión, viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar og starvsfólkadeildin
att. Una Fagraberg
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*